TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Ráðhúsið

Stjórn kommununnar, t.e. borgarstjórin, kommunustjórin og trivnaðarstjórin, húsast í Ráðhúsinum.

Í hesum sambandi er felags stjórnarskrivstova og móttøka gjørd í ráðhúsinum, ið tú verður ein partur av.

Hinar deildirnar í Ráðhúsinum eru mentamáladeildin og starvsfólkadeildin.

- onnur leys størv?
Hygg á
www.torshavn.fo

# Skrivari til Borgarstjóran

Søkt verður eftir skrivara til borgarstjóran. Tú kemur í tøttum samstarvi við borgarstjóran at gera uppskot til kunningarskriv og røður, umframt at skipa fyri avtalum og fyrireika og luttaka á fundum.

Tú fært eisini aðrar uppgávur, sum vit tosa um í eini møguligari setanarsamrøðu, ið ætlandi verður í viku 16.

**Førleikakrøv**
Tú skalt hava viðkomandi útbúgving/royndir. Neyðugt er at tú dugir væl at málbera teg, bæði munnliga og skrivliga á føroyskum og donskum. Eisini er neyðugt at tú dugir enskt.

Umráðandi er, at tú ert røkin, dugir væl at leggja til rættis, ert fyrikomandi, kanst arbeiða sjálvstøðugt og dugir væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært avvarðandi sáttmála.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Heðin Mortensen, borgarstjóra, ella Jens M. Poulsen, kommunustjóra, tlf. 302010.

**Umsókn**
saman við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera Tórshavnar kommunu, postboks 32, FO-110 Tórshavn, í hendi í seinasta lagi mánadagin 11. apríl 2005. Viðmerk á umsóknina "skrivari".

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Sosiala deild

Sosiala deild er partur av trivnaðarfyrisitingini og umsitur m.a. barnaverndarmál í Tórshavnar kommunu.

- onnur leys størv?
Hygg á
www.torshavn.fo

# Stuðulsfamilja

Barnaverndin í Tórshavnar kommunu søkir eftir stuðulsfamilju til móðir og hálvt ára gamla barn hennara.

Vit leggja stóran dent á, at familjan tekur ábyrgd av menning barnsins og ger hetta í tøttum samstarvi við mammuna. Eisini er umráðandi at familjan kann veita báðum umsorgan og mammuni vegleiðing.

**Sum stuðulsfamilja fáa tit:**
- spennandi og mennandi arbeiði, sum tíðum kann verða kravmikið
- tætt samstarv við sosialu deild
- samsýning fyri arbeiðið

Vit vænta av tykkum, at tit eru sinnað at samstarva við bæði familjuna, barnarverndina og møguliga aðrar samstarvspartar.

Tit skulu búgva í Eysturoynni ella á Streymoynni.

**Meiri fæst at vita**
við at venda tykkum til Selmu Ellingsgaard, sosialráðgeva, tlf. 302010

**Umsókn**
saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, FO-110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 1. apríl 2005

T Ó R S H A V N A R K O M M U N A



# Diplomútbúgving sum demenssamskipari

Frá juni til desember 2005 skipar Tórshavnar kommuna fyri diplomskeiði sum demenssamskipari. Skeiðslæran hevur til endamáls at menna førleika teirra, sum starvast á føroyska heilsu-, eldra- og forsorgarøkinum og serliga fáast við fólk, ið eru rakt av demens.

Hetta er aðru ferð at skeiðið verður hildið í Føroyum. Alzheimerfelagið skipaði fyri fyrsta skeiðnum og hesaferð verður tað Tórshavnar kommuna, sum fer at standa fyri útbúgvingini.

**Skeiðið er mest ætlað hesum yrkisbólkum:**
- sjúkrarøktarfrøðingum
- ergo- og fysioterapeutum
- námsfrøðingum
- heilsuatstøðingum
- røktarheimsatstøðingum

Luttøkan treytar, at tú veitst eitt sindur um og hevur arbeitt við fólkum, sum eru minnisveik.

Sjúkrahjálparar og onnur, ið hava vitan um og hava arbeitt við minnisveikum fólkum ella hava aðrar førleikar, kunnu eisini søkja um at sleppa á skeiðið.

**Skeiðið verður hildið á Hotel Tórshavn-Sjómansheiminum, og er í trimum pørtum:**

- **Ástøði um demens** (13.-17. juni)
- **Samskifti, umsorgan og løgfrøði** (29. aug.-1. sept.)
- **Demenssamskiparin** (12.-14. des.)

Skeiðsleiðarar eru Birgitte Vølund, sjúkrarøktarfrøðingur og samskipari, Mette Søndergaard, ergoterapeutur og Rolf Bang Olsen, serlækni í psykiatri, og yvirlækni á eldrasálardeild í Danmark, sum tók stig til demenssamskiparaútbúgvingina tilrættalagd av Omsorgsorganisationernes Samråd í Danmark.

Í tíðarskeiðnum millum teir triggjar skeiðspartarnar arbeiða næmingarnir við ítøkiligari skrivligari evnisætlan, ið teir sjálvir hava valt. Næmingarnir mugu fáa frí í 7 arbeiðsdagar at gera hetta arbeiðið. Eftir seinasta skeiðspart verða prógv handaði.

Kostnaður: 22000 krónur. Fyri tað fær næmingurin frálæru, skeiðstilfar, einakamar og fullan kost. Kostnaður uttan gisting: 19000 krónur. Skeiðið kann gjaldast yvir tvey fíggjarár.

Tað er pláss fyri 20 næmingum. Skeiðið verður hildið treytað av, at nóg nógv tekna seg.

Áhugað kunnu tekna seg viða at venda sær til Snarskivuna, tlf. 302010. Eru spurningar, kann ringjast til Heimvitjanartænastuna á tlf. 302063 millum kl. 8.00-9.00 gerandisdagar, ella senda teldupost til jonvor@torshavn.fo, har tað eisini er møguligt at melda luttøku.

Seinasta freist at melda luttøku er mikudagin 27. apríl 2005.

w w w . t o r s h a v n . f o

Sosialurin i Sosialurin